# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 19. februar 2008, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Jón Mikkelsen, Pauli Trond Petersen, Jákup Oluf Hansen, Øssur Christiansen, Jóhan Hendrik Hansen og Marjun S. Olsen.
**Skrivari**: Jákup Durhuus.

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð:**

**Mál 8.**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd um asfaltering í 2008.
J. nr. 2005-564
Nevndin mælir til í fyrstu syftu at asfaltera

- frammanfyri og rundanum nýggju brandstøðina,
- frammanfyri nýggja bátadráttin í grótbrotinum í Stóragerði,
- Hornaveg frá svinginum omanfyri hjá Jónfinn Egilsnes niðan til svingið innanfyri hjá Remi Thorleifsson
- Flatnaveg frá omanfyri húsini hjá Paulinu Poulsen og inn til Deildargøtu niðanfyri hjá Siggu Jóanesarson.

Nevndin mælir til at asfalteringin verður fíggjað yvir kontu nr. 700010: íløgur til teknisk mál.

**Viðv. 8.**
Einmælt samtykt at útseta málið til næsta fund.

Jóhan Hendrik Hansen farin av fundinum.

**Mál 9.**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini til munnligan fyrispurning frá Jóhan Hendrik Hansen um loyvi til at keypa grundstykki til at byggja framsýningarhús á.
J. nr. 2005-600
Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti treytað av, at keypsprísurin verður goldin innan ávísa tíðarfreist, og at kommunan tryggjar sær 1. veðrætt í grundstykkinum.

**Viðv. 9.**
Tilmælið einmælt samtykt.

Jóhan Hendrik Hansen komin aftur á fundin.

Bókin lisin

Fundur lokin $20^{45}$.

Sign:

Karl A. Olsen
Jón Mikkelsen
Pauli T. Petersen
Jákup Oluf Hansen
Øssur Christiansen
Jóhan Hendrik Hansen
Marjun S. Olsen